# Kostar einki at biðja tyrlu koma eftir sjúkum manni

**- Tá ið maður gerst sjúkur umborð ella fær skaða, verður avgerðin um, hvussu fram skal farast, vanliga tikin í samráð við lækna, sigur Mortan Johannesen, sum eigur Ljósafelli**

ARBEIÐSSKAÐAR
*Vilmund Jacobsen*



Fyrr í vikuni høvdu vit grein um ungan drong, Rógva Danielsen, sum fekk skaða í hondina umborð á trolaranum, Ljósafelli, sum er á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum.

Í samrøðu við blaðið, vísti pápi drongin, Gunnleif Danielsen á, at tað tók heilar 19 timar, áðrenn sonurin kom undir læknahond í Íslandi.

Tað lá líkasum í luftini, at langa siglingartíðin til lands hevði gjørt viðgerðina í Reykjavík truplari, tí drongurin hevði fingið kolbrand ella byrjan til kolbrand í hondina.

## Skipari og lækni

Mortan Johannesen, sum eigur Ljósafelli, harmast um skaðan, sum drongurin fekk. Hann er tó onga løtu í iva um, at skiparin gjørdi tað, hann helt vera rætt.

- Tá ið skaði hendur, sum krevur læknaráð, ella sjómaður gerst sjúkur umborð, tosar skiparin við lækna. Eru teir samdir um, at maðurin eigur at koma undir læknahond, verður eisini tosað um, hvussu best er at gera, og støðan verður tikin hareftir.

Hann vísir á, at tá ið drongurin í hesum førinum fekk skaða umborð á Ljósafelli, varð hildið, at skipið átti at flyta mannin til stytstu havn í Íslandi.

- Eg ivist onga løtu í, at henda avgerðin er tikin eftir bestu sannføring, sigur Mortan.

*- Vit hava ongantíð fingið rokning fyri tyrlu, sum hevur verið umborð eftir sjúkum manni, men hetta er ein avgerð, sum skipari og lækni taka í felag, sigur Mortan Johannesen, sum eigur Ljósafelli*

## Tyrla kostar einki

- Vit hava ongantíð fingið rokning fyri tyrlu, sum hevur verið umborð eftir sjúkum manni, men hetta er ein avgerð, sum skipari og lækni taka í felag.

Mortan vísir á, at tað er dýrari fyri reiðaríið at sigla til lands við sjúkum manni enn at boðsenda tyrluni.

- Í hesum førinum hevði Ljósafelli langan veg til lands, og tí hevði tað verið bíligari fyri reiðaríið, um tyrla fleyg ímóti skipinum og flutti mannin á sjúkrahús. Men hetta er sum nevnt ein avgerð, ið tikin verður í samráð við lækna.

Mortan leggur dent á, at í slíkum føri, tá ið skaði hendur umborð, ella maður gerst sjúkur, verður ikki hugsað um, hvat tað kostar at fáa hann til lands.

- Tá ið drongurin í hesum førinum fekk skaða umborð á Ljósafelli, avgjørdi skiparin at hála beinanvegin og seta kós móti nærmasta landi.

Hann vísir á, at Ingolf Rasmussen, sum er skipari umborð á Ljósafelli, er nógv avhildin maður, sum er kendur fyri at vilja manningini tað besta.

- Tí eri eg onga løtu í iva um, at hann gjørdi tað, sum hann helt vera tað besta fyri drongin, soleiðis sum støðan var, sigur Mortan Johannesen at enda.

# Ferðamannaskip í Mykinesi og Vestmanna

**Fyrst í vikuni vitjaðu 80 amerikumenn umborð á Clipper Adventurer í Mykinesi og Vestmanna**

SUMMAR
*Vilmund Jacobsen*

Fyrst í hesi vikuni kom lítla ferðamannaskipið, Clipper Adventurer, til Føroya úr Hetlandi.

Henda vitjan var rættiliga nógv øðrvísi enn tær vitjanir, vit vanliga kenna, tá ið ferðamannaskip leita higar.

Tað, vit vanliga síggja, eru risastór ferðamannaskip, sum koma á Havnina, og síðan fara ferðafólkini úr Havnini og í ymsar ættir.

## Mykines og Vestmanna

Men leiðin hjá Clipper Adventurer bar ikki á Havnina.

Fyrst vitjaði ferðamannaskipið í Mykinesi, men hóast skipið er lítið í mun til ferðamannaskip, vit vanliga síggja, slapp tað sjálvsagt ikki at har úti.

Bátar fluttu nevniliga meginpartin av teimum 80 amerikansku ferðafólkunum, sum eru umborð á Clipper Adventurer, í land í Mykinesi.

Veðrið var av tí besta hendan dagin, og fingu ferðafólkini tískil nakrar góðar tímar har úti saman við mykinesfólki og súlunum, sum munnu hava hugtikið meira enn nakað annað.

Úr Mykinesi bar leiðin til Vestmanna, har skipið lá til morgunin eftir.

## Aftur til Føroya

Úr Vestmanna bar leiðin hjá Clipper Adventurer til Íslands, har skipið vitjar í fleiri býum og bygdum kring um landið.

Ferðin í Íslandi endar í Reykjavík, har ferðafólkini flúgva heim í flogfari, og nýtt fólk kemur umborð.

Clipper Adventurer kemur aftur til Føroya, 24. juni.

Skipið er bygt í Jugoslaviu í 1975. Tað siglir undir Panama-flaggi, og ivaleyst eru tað hálendarar, sum eiga skipið.



*Tað er ikki so vanligt, at útlendsk ferðamannaskip vitja í Mykinesi og Vestmana, har henda myndin er tikin. Clipper Adventurer verður aftur í Føroyum, 24. juni.*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*



# FA ræðist politisk inntriv

**Vandi er fyri, at verkfalsrætturin hjá fakfeløgunum verður skerdur. Tað sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya arbeiðarafelag, nú Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaði, hevur boðað frá, at fleiri politisk inntriv í arbeiðsmarknaðin eru í væntu**

ARBEIÐSRÆTTUR
*Ingi Rasmussen*

Føroya arbeiðarafelag óttast, at rætturin hjá fakfeløgum verður skerdur, nú landsstýrismaðurin við arbeiðsmarknaðarmálum hevur boðað frá, at hann ætlar at leggja fleiri uppskot fyri løgtingið í heyst, sum skulu dagføra viðurskifti á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

– Eg eri alt annað enn trygg við tey politisku inntrivini, sum Fólkaflokkurin ætlar at gera. Bjarni Djurholm er í ferð við at skerja rættin hjá fakfeløgunum at fara í verkfall. Hann tekur ein part burturúr og gloymir við vilja, at tað eru tveir partar í einum stríði, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya arbeiðarafelag.



*Tað skal vera torførari at steðga samfelagshjólunum at mæla, ætlar Bjarni Djurholm. Men tað er at skerja rættin hjá fakfeløgunum at forða verkføllum, sigur Ingeborg Vinther*

*Mynd: Jens K. Vang*

## Fleiri broytingar

Sostatt er alt við tað gamla á arbeiðsmarknaðinum, og tað tykist at verða heldur enn ikki torført at fáa broytt viðurskifti, sum hava gjørt sítt til fleiri maratonverkføll síðstu árini.

Við Sosialin í síðstu viku segði Bjarni Djurholm frá sínum ætlanum, sum hann nú hevur fingið grønt ljós frá landsstýrinum at arbeiða víðari við. Lógin um seming, sum er frá 1928 skal broytast. Eitt nú skal vera loyvt semingsmonnunum at útseta eitt verkfall í tvær ferðir tvær vikur. Sum nú er kann semingsmaðurin bara útseta eitt verkfall í eina viku.

Landsstýrismaðurin ætlar eisini at gera undantøk, so ávísar vinnur, har vandi er fyri at sjúka breiðir seg, sleppa undan at vera raktar av verkfalli. Í triðja lagi ætlar Bjarni Djurholm at taka framaftur arbeiðsrættin, sum fakfeløgini ikki hava vilja vitað av.

## Deyðadømur rættur

Tað tykist, sum arbeiðsrætturin er deyðadømdur av fakfeløgunum frammanundan.

– Vit hoyra onki gott um arbeiðsrætt, tí tað vísir seg ofta, at arbeiðsgevararnir fáa fyrimun av honum. Vit hava í staðin skotið upp, at vit fáa ein víðkaðan gerðarætt, men tað hevur verið blokerað higartil. Munur er á, hvussu ein gerðarættur er mannaður, og hann kann ikki geva bøtur, sigur Ingeborg Vinther.

Ein arbeiðsrættur verður útnevndur av báðum pørtum á arbeiðsmarknaðinum. Endamálið er at savna serfrøðina, so trætur á arbeiðsmarknaðinum verða loystar skjótt. Kunningarstjórin hjá LO, Rune Nørgaard, segði við Dimmalætting í gjár, at ongin orsøk var at halda, at arbeiðsrætturin er partískur. Men Ingeborg Vinther hevur onga tiltrúgv til, at tað ber til at fáa ein óheftan arbeiðsrætt í Føroyum.

– Tað hevði verið torført at útnevnt dómarar í Føroyum, sum høvdu verið heilt óheftir. Danski arbeiðsrætturin hevur seks dómarar, sum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar hava valt. Skulu vit arbeiða eftir donskum leisti, verður tað vónleyst at finna dómarar, sum ikki onkursvegna hava felags áhugamál við arbeiðsgevararnar, sigur Ingeborg Vinther.

## Kolldømd freist

Heldur ikki broytingarnar í lógini um seming, sum er frá 1928, hóva forkvinnuni í Føroya arbeiðarafelag. Bjarni Djurholm royndi seg longu fyri tveimum árum síðani og sendi ætlaðu broytingarnar fyri fakfeløgini. Tey kolldømdu ætlanina.

– Vit kenna ikki hetta seinasta uppskotið, tí vit hava ikki sæð tað enn, men sambært tí seinasta uppskotinum, sum vit sóu, skuldi tað bera til at útseta eitt verkfall í eina óendaligheit, og tað kunnu vit ikki góðtaka, sigur Ingeborg Vinther.

Bjarni Djurholm sigur seg ætla at geva semingsmonnunum møguleika at útseta eitt verkfall í fyrst tvær vikur og síðan aftur tvær vikur, um tað er neyðugt. Í LO sigur tey seg vera væl nøgd við hesa skipan, tí hon gevur pørtunum longri freist at finna eina semju sínámillum, so tað slepst undan verkfalli.

## Lógleys undantøk

Aftur í hesum verkfallinum var nógv at hoyra um alivinnuna, sum segðist at vera á deyðastrá, tí ILA-sjúkan breiddi seg sum ringar í vatninum.

Hesum og líknandi støðum ætlar Bjarni Djurholm at forða fyri í framtíðini, og tað skal gerast við at gera undantøk fyri ávísar vinnur, so tær sleppa undan at vera raktar av verkfalli.

– Verður noktað ávísum arbeiðsfólkum at fara í verkfall, tá tey eru í sáttmálaloysi, so eru øll ikki líka fyri lógini. Hetta er enn ein roynd at brúka alivinnuna ímóti fakfeløgunum, sum tað er hent, hvørja ferð eitt verkfall hevur verið. Vit vita, at Fólkaflokkurin er í lummanum hjá arbeiðsgevarunum, og tí vil Bjarni Djurholm so fegin gera undantøk. Men tað er reint anarki og lógloysi at skerja rættindini hjá ávísum arbeiðsfólkum, sigur Ingeborg Vinther.

Eftir øllum at døma skal óvanliga gott hegni til, um Bjarni Djurholm skal fáa undirtøku frá fakfeløgunum til fráboðaðu broytingarnar. Og fær hann ikki tað, verður eisini torført at fáa politiskt viðhald í løgtinginum, sum altíð lurtar væl eftir fjøldini av løntakarum.

**Fakta**

### Dreymurin hjá Djurholm:

– Lógin um seming, sum er frá 1928, skal broytast. Semingsstovnurin skal hava størri heimildir og longri freist. Semingsmenn skulu hava loyvi at útseta verkfall í tvær ferðir tvær vikur, og skulu hava loyvi at fara uppí, longu meðan partarnir samráðast.

– Ætlanin við arbeiðsrætti er eisini tikin framaftur. Ein arbeiðsrættur verður útnevndur av bæði arbeiðsgevarum og arbeiðstakarum. Endamálið er at savna serfrøðina á einum stað, so ósemjur kunnu loysast skjótari enn í sivila rættinum.

– Alivinnan og landbúnaðurin skulu verjast ímóti verkfalli í serligum førum, so hóttandi sjúka ikki fær loyvi at breiða seg.